


Helga Bára Mohr Vang,
lívfrøðilesandi

# Alheimslig dálking

**Seinastu 100 árini er heimurin broyttur nógv. Kemikalii, sum vóru so at siga ókend fyrr, verða nýtt til øll møgulig endamál nú. Summi av hesum evnunum eru ikki heilt vandaleys og kunnu hava neiligar fylgjur. PCB er eitt evni, sum føroyingar ikki hava framleitt sjálvir, men tað er tó at finna í føroyskari bróstamjólk. Hetta evnið er ikki vandaleyst og kann hava við sær nógvar trupulleikar fyri komandi ættarlið í Føroyum**



Í Føroyum hevur PCB ongantíð verið framleitt og ei heldur hevur tað verið nýtt í stórum nøgdum. Men hóast tað vísa kanningar, at í føroyskari bróstamjólk er innihaldið av PCB høgt. Kanningar hjá føroyska granskaranum Pál Weihe í tíðarskeiðinum 1994-1995 vístu, at í roynd og veru eru nógv størri nøgdir av PCB at finna í mjólkini hjá føroyskum barnakonum enn t.d. hjá barnakonum í Svøríki ella Kanada. Hesi londini eru tó nærri við upprunakelduna enn Føroyar.

## Føroyski maturin fær skyldina

Orsøkin til, at føroyskar barnakonur hava meira PCB í mjólkini enn kvinnur í grannalondunum vísir seg at vera kosturin. Føroyar liggja jú mitt í sjónum, og tí er tað natúrligt, at ein stórur partur av okkara gerandiskosti kemur úr sjónum. Kanningarnar vístu, at tað var ein týðiligur munur á føroyskum kvinnum, sum ótu lítið av siðbundnum føroyskum mati, so sum sjófugli og spiki, og teimum kvinnum, sum ótu meir av hesum, – teirra mjólk var meira dálkað av PCB.

Kroppurin sleppur ikki av við PCB

PCB verður seint niðurbrotið í okkara kroppi. Einasti munadyggi hátturin, ið kroppurin kann sleppa av við PCB´ið er við at framleiða bróstamjólk. Hetta er ikki heppið, tí PCB er nógv hættisligari fyri ein nýføðing, sum er lítið mentur, enn fyri eitt vaksið fullment fólk.

Tað at PCB verður so seint niðurbrotið, merkir eisini, at tann kosturin, sum ein kvinna etur, áðrenn hon gerst við barn, hevur nógv at siga. Og tá meinast við fleiri ár áðrenn, hon gerst við barn. Tað er nyttulítið at gevast við at eta PCB-ríkan mat bert tað tíðarskeiðið, sum kvinnan er við barn. Best er, at sum minst verður etið av hesum kosti, so leingi sum kvinnan hevur ætlanir um at fáa børn.

## Boðberarnir í kroppinum órógvast

Hóast PCB bert er deyðiligt í sera stórum nøgdum, so hevur tað nógvar neiligar fylgjur. Ávísir formar av PCB líkjast nógv okkara egnu hormonum. Tí órógvar PCB tær kropsfunktiónir hjá okkum, sum eru stýrdar av júst hesum hormonum.

Ein formur av PCB líkist nógv kvinnuliga hormoninum østrogeni, og ein annar formur líkist nógv hormoninum thyroxin. Thyroxin er týdningarmikið fyri menningina av heilanum. Kanningar hava víst,




*Hendan myndin vísir ein samanhang millum nøgd av PCB í nalvastreingi á nýføðingi og innlæringarevnini hjá sama nýføðingi seinni í lívinum. Kanningar gjørdar í USA 1990. (Poul Bjerregaard, Økotoksikologi 2005)*

Sosialurin